# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Lagnufundur

G20 fundurin í London nú hósdagin er lagnufundur fyri heimin. Á G20 fundi hittast 20 tey mætastu ídnaðarlondini í heiminum. Hesi lond bæði samstarva og kappast og skulu nú í felag royna at bjarga heimsbúskapinum. G20 fundirnir eru ikki bara vælumtóktir. Nógv lond halda, at búskaparliga og fíggjarliga lagna heimsins í kreppuni er betur farin við eini felags heimsfevnandi skipan, har eitt nú Heimsbankin skipar fyri og gongur á odda. Síðan kreppan av álvara tók seg upp, hava USA og flestøll framkomin lond sett í verk hópin av fíggjarligum og búskaparligum hjálparpakkum til tess at tryggja bankakervini og fyri at halda vinnuligu hjólunum malandi. Trupulleikarnir eru sera stórir. Heimshandilin er linkaður, vandin fyri proteksionismu øktur, og arbeiðsloysið er vaksandi um allan framkomnan heim. Hetta gongur so aftur út yvir menningarlondini, og soleiðis vindur skeiva gongdin uppá seg. Hættislig støða, ið kann elva til politiskan ófrið og beinleiðis koma heimsfriðinum í vanda.

Stjórnir standa ivandi og ráðaleysar mótvegis hesi kreppu, ið sum ein sunami fløðir inn yvir eitt land fyri og annað eftir. USA hevur gingið á odda við bankahjálparpakkum og vinnuligum hjálpartiltøkum, meðan europear hava verið eitt sindur meira afturhaldandi við ógvusligum almennum tiltøkum. Orsøkin kann vera, at Europa fyri tað fyrsta óttast inflatión, ið kann standast av hesum ovurstóru hjálparpakkum fyri skattgjaldarans pening. Fyri tað annað hava nógv tey flestu ES lond, EFTA lond og onnur europeisk ídnaðarlond samhaldsfastar sosialar skipanir, ið tryggja, at fólk ikki beinanvegin missa hús og heim ella líða beinleiðis neyð, um maður ella kona gerast arbeiðsleys. Øðrvísi er í USA, har hesar grundleggjandi skipanir mangla ella eru farnar fyri bakka við bankunum. Luttakararnir á G20 hava tískil ymsar fortreytir og ymisk baksýni fyri fundinum.

G20 má og skal fáa fastatøkur á stóru altjóða trupulleikunum. Flestøll lond seta teirra álit á sera væl lýdda amerikanska forsetan, Barak Obama, ið longu hevur sýnt framúr áræði, dirvi, ágrýtni og virkisfýsni. Men fleiri G20 lond eru eisini ósamd við amerikanska forsetan um mál og útvegir. Avbjóðingin hjá Obama er sostatt at sameina ymisk sjónarmið, ymisk áhugamál og ymiskar tilgongdir til trupulleikarnar við atliti at einum felags heimsfevnandi kreppustrategi. Heimligu fortreytir Obamas eru ikki tespiligar: metstór skuld til Kina, methall á fíggjarlóg, kríggj í Irak og í Afghanistan, ein viknandi dollari, tryggingargeiri í beinabjølgi, banka-, byggi- og ídnaðargeirar í skeljasori – alt takkað verið ábyrgdarleysu og stuttskygdu neoliberalismuni hjá George W. Bush og fylgisneytum. Obama hevur mestsum bert sítt sera góða umdømi, sítt vit og sítt skil, sínar framúrskarandi persónligu eginleikar og sítt stak dugnaliga starvslið at líta á. Men hvør veit, um ikki tað júst er hetta, ið bjargar lagnufundinum í London og harvið bjargar heimsbúskapinum.

**Sosialurin**

## Menningarhjálp á breddan

**FRANTS JENSEN**
Fuglafjørður



Setti meg spentan framman fyri sjónvarpið hóskvøldið í seinastu viku at hyggja eftir, hvat Kringvarpið fór at borðreiða við, nú teir høvdu lýst við einum evniskvøldi, har føroysk menningarhjálp var á skránniMá siga, at tað var spennandi í sjálvum sær, at okkurt annað var á matarlepanum, enn tey mongu heimligu politisku kjakevnini, embætisligar frágreiðingar og líknandi, sum vit ofta eru ovfóðrað av.

Vit tosa nógv um globalisering. Endiliga eitt dømi um, at globalisering ikki bara merkir at slúka alt rátt, sum kemur uttanífrá inn á okkum, men at vit nú fara út í heim og bjóða okkum fram. Rós til Kringvarpið, at tað lítur út um okkara egna land, og enntá longur enn til okkara grannalond – men til tað fremmanda og ókenda.

Myndir og frásøgur frá fátøkum, heimleysum, foreldraleysum, hungursraktum og krígsherjaðum afrikanarum, síggja vit rímiliga regluliga gjøgnum útlendskar sjónvarpstøðir, men at síggja føroyska kringvarpmanning á staðnum, sum journalistiskt viðger tey truplu viðurskiftini, ið hesi menniskjuni liva undir, ja, tað minnist meg ikki hevur verið í føroyskum sjónvarpi áður – burtursæð frá nøkrum einstøkum sendingum fyri fleiri árum síðani um føroyskar trúboðarar, ið hava virkað í Afrika.

Tað merktist á nøkrum av innsløgunum, at Kringvarpið ikki hevur tær stóru royndirnar at gera tílíkar sendingar, men samstundis vóru onnur av innsløgunum sera góð, hugtakandi og góðu nakað at hugsa um.

Eins og Kringvarpið kundi virka eitt sindur trilvandi, so virkar tað eisini, sum um politiska skipanin er eitt lítið sindur trilvandi, tá ið tað ræður um at finna eina skipan, hvør og hvat skal fáa menningarhjálp og, hvussu alt hetta skal skipast í framtíðini.

Tað var ein skomm, so lítil sum føroyska menningarhjálpin var fyri nøkrum árum síðani (300.000 krónur – og tá var henda lítla upphæddin ofta brúkt til neyðhjálp). At hon kom upp á tríggjar milliónir fyri nøkrum árum síðani er eitt framstig, men eftir mínari meining, átti hon at verið munandi hægri. Vit ríku Føroyar kunnu jú saktans geva munandi meir víðari til teirra, sum líða neyð og liva undur trongum og fátæksligum korum. Kanska henda umrøðan av menningarhjálp í Kringvarpinum, nú fær politikararnar at taka hetta málið fram aftur.

Tað er gleðiligt, at føroyingar gera eitt hjálparарbeiði í øðrum londum, sum veruliga hava brúk fyri hjálp. Gjøgnum hesa sending fingu vit innlit í tvær av hesum verkætlanunum. Tað, sum hinvegin ikki kom serliga týðiligt fram í sendingini, var, at meginpartin av restini av føroysku menningarhjálpini, sum higartil er latin, er farin til danskar og aðrar altjóða felagsskapir, sum føroyingar ikki beinleiðis hava verið ein partur av ella hava ávirkan á. Grundgevingin hevur verið, at landið hevur valt kendar sokallaðar NGO-felagsskapir, sum hava royndir á økinum, og sum landið eisini metir seg hava álit á, sum kunnu tryggja, at peningurin kemur fram til brúkaran.

Misskil meg ikki, almenn føroysk menningarhjálp skal avgjørt ikki bara latast gjøgnum føroyingar og føroyskt arbeiði, ið verður gjørt í einum menningarlandi. Men um bara ein rættiliga avmarkaður partur av menningarhjálpini verður latin henda vegin, so fáa føroyingar og føroyskir felagsskapir, sum gera eitt arbeiði í einum menningarlandi, lítlar og ongar royndir og verða meira ella minni avskornir frá almennum stuðli í framtíðini – og tað er ein skomm.

Henda nýggja royndin hjá Kringvarpinum at seta menningarhjálp á breddan er vælkomin – hóast tað ikki er neyðugt at gera eina nýggja tríggja-tíma maratonsending, tí so ganga helst aftur alt ov nógv ár, áðrenn nakað líknandi verður aftur á skránni.

## Góði Kári P Højgaard

**JÓANNES EIDESGAARD**
floksformaður



Eg havi fingið skriv frá tær sum formaður fyri Javnaðarflokkin. Fyri at vera heilt erligur, so undraðist eg ikki sørt yvir, at tú sendi mær hetta skriv, tí tú hevur hóast alt verið tingmaður nú í nøkur ár og kennir eins væl og eg sjálvur, hvussu orðaskiftið mangan fer fram á Føroya Løgtingi.

Men mínar viðmerkingar til skriv títt eru hesar:

Javnaðarflokkurin fer ikki at leggja seg út í, hvussu okkara egnu tingfólk ella tingfólk úr øðrum flokkum málbera seg á tingi. Har valdar tælufrælsi, og hvør tingmaður má sjálvur standa til svars fyri tí, ið sagt verður bæði í mun til formansskapin og egnu veljarar.

Annars má eg staðfesta, at støðið á tí, sum verður sagt frá tingsins røðarapalli, er fallið munandi seinnu árini. Men hetta er so ein avleiðing av, hvat formansskapurin letur um seg ganga.

Tað, sum John Johannesen segði, var ein staðfesting av arbeiðsslagnum hjá Kára á Rógvi. Eg má siga, at hetta er fyri lítið at rokna í mun til, hvat er sagt av tingmonnum eisini av Kára á Rógvi um aðrar tingmenn. So seint sum í síðstu viku, var eg persónliga niðurgjørdur av tingmanni, uttan at hann varð átalaður av formanninum.

Aðrar viðmerkingar havi eg ikki til skriv títt.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.